LØGTINGSINS
UMBOÐSMAÐUR

Barna- og útbúgvingarmálaráðið
Postboks 3279,
Tinghúsvegur 7
110 Tórshavn

Tórshavn, tann 2. juni 2023
J.Nr.: LUM-16- 22/21174-28
(at tilskila í svari)
Tykkara J.nr.

**Viðvíkjandi grundgeving, dagfest 1. november 2022, ísv. setan av skúlastjóra í Vestmanna skúla.**

Tann 18. november 2022 sendi klagarin mær soljóðandi klagu um grundgevingina, ið klagarin hevði fingið frá Uttanríkis- og mentamálaráðnum, tann 1. november 2022.

> "...
> Løgtingsins umboðsmaður heitti í áliti tann 1. juli 2022, Uttanríkis- og mentamálaráðið um at geva mær eina grundgeving, ið lýsti hvørji atlit hava verið berandi fyri støðutakanina hjá landsstýrismanninum fyri ikki at seta meg í starvið sum skúlastjóra í Vestmanna skúla.
>
> Tann 1. november 2022 fekk eg umsíðir eina nýggja grundgeving frá UMMR. Hóast UMMR hevur havt 4 mánaðir at umhugsa eina betri grundgeving, haldi eg framvegis ikki, at eg havi fingið eitt nøktandi svar.
>
> Í hesi nýggju grundgevingini sigur UMMR m.a., "Tygum valdi ikki at senda inn nøkur viðmæli innan nevndu freist, hóast starvslýsingin legði upp til tað. Tá ið landsstýrismaðurin so hevur valt at raðfesta viðmælini høgt, broytist innstillingin soleiðis, at tann setti bleiv mettur sum tann best skikkaði til starvið."
>
> Í starvslýsingini til starvið sum skúlastjóri stóð: "*og møguligum viðmælum*". Tá eg søkti starvið, var eg fyrstilærari í ... Tá eg tók við leiðsluni var skúlin í djúpari kreppu, og eg hevði í hesum sambandi eitt javnt og gott samskifti við UMMR. Sum fyrstilærari hevði eg beinleiðis tilvísing til UMMR, og kendi setanarmyndugleikin meg væl. Tí helt eg tað vera óneyðugt at biðja sama myndugleika um at geva mær eitt viðmæli, áðrenn eg søkti starvið.
>
> Eg skilji ikki, hvussu landsstýrismaðurin kann leggja dent á viðmælir, tá hetta ikki var eitt krav í starvslýsingini, og setanarnevndin heldur ikki helt tað vera neyðug at útvega slík viðmælir.
>
> Um tað er satt, at viðmælini høvdu so stóran og avgerðandi týdning, haldi eg, at avgerðin ikki er tikin á einum nøktandi grundarlagi, tí sambært álitinum frá umboðsmanninum frá 1. juli 2022, hevur ein almennur myndugleiki skyldu at upplýsa málið soleiðis, at umsøkjarnir kunnu metast á jøvnum føti.
>
> Umframt hetta sigur UMMR í síni grundgeving, at dentur varð lagdur á fjølbroyttar og viðkomandi leiðsluroyndir, sum tann setti umsøkjarin í størri mun enn tygum varð mettur at hava.
>
> Eg havi ongan møguleika at eftirkanna um hetta er rætt. Sambært alment atkomuligum upplýsingum, haldi eg meg hava meira viðkomandi leiðsluroyndir enn tann setta, men eg havi ikki atgongd til hvørjar ítøkiligar leiðsluroyndir viðkomandi hevur, sum eru meira fjølbroyttar enn mínar.
>
> Av tí, at eg eri í iva um tann grundgevingin, sum eg havi fingið frá UMMR, er sonn, fari eg at heita á umboðsmannin um at eftirkanna, um tann setta hevur meira fjølbroyttar og viðkomandi leiðsluroyndir enn eg, og at tann grundgeving, sum eg nú havi fingið frá UMMR, er røtt."

undir Bryggjubakka 11 • Postrúm 2008 • FO-110 Tórshavn • Tlf. 358500 • Faks 358501 • lum@lum.fo • www.lum.fo

Klagan er grundað á niðurstøðu mína í áliti: *"Álit viðvíkjandi klagu um málsviðgerðina hjá Uttanríkis- og mentamálaráðnum í sambandi við setan av skúlastjóra í Vestmanna skúla"*, dagfest 1. juli 2022 (LUM 21/23892).

Samandrátturin av niðurstøðu umboðsmansins í álitinum, ið kann lesast í fullari longd á lum.fo, er soljóðandi:

> "...
> Klagarin førdi fram, at landsstýrismaðurin ikki hevði givið eina nøktandi grundgeving fyri, hví klagarin ikki varð settur í starv sum skúlastjóri, hóast setanarnevndin í sínum tilmæli hevði tilnevnt hann sum nr. 1 til starvið. Klagarin klagaði eisini um, at avgerðin hjá landsstýrismanninum var tikin, uttan at málið var lýst til fulnar.
>
> Í frágreiðing til umboðsmannin, í sambandi við klaguna, gjørdi Uttanríkis- og mentamálaráðið m.a. greitt, at tilmælið frá setanarnevndini ikki var bindandi fyri landsstýrismannin. Ráðið greiddi frá, at setanarnevndin hevði tilnevnt tríggjar umsøkjarar til starvið í talmerktari raðfesting, og at landsstýrismaðurin hevði heimild at taka avgerð um at velja ein annan av hesum umsøkjarum til starvið enn tann, ið setanarnevndin hevði tilnevnt sum nr. 1. Harafturat førdi ráðið fram, at tá talan var um eitt setanarmál, vóru krøvini til grundgeving linari enn í øðrum avgerðarmálum.
>
> Umboðsmaðurin tók undir við Uttanríkis- og mentamálaráðnum, at tilmælið frá setanarnevndini ikki var bindandi fyri landsstýrismannin. Hóast hetta, so hevði landsstýrismaðurin sambært umboðsmanninum ikki fingið fríar ræsur at velja og vraka millum umsøkjararnar, ið vóru til starvið. Avgerðin hjá landsstýrismanninum skuldi, umframt at hava heimild í lóggávu, millum annað lúka vanlig fyrisitingarrættarlig krøv, eitt nú skylduna at grundgeva, skylduna at føra eina sakliga fyrisiting og skylduna at lýsa eitt mál, áðrenn ein avgerð varð tikin.
>
> Umboðsmaðurin tók ikki undir við Uttanríkis- og mentamálaráðnum, at krøvini til grundgeving í hesum føri vóru linari enn í øðrum avgerðarmálum. Umboðsmaðurin metti, at grundgevingin ikki samsvaraði við almenna setanarpolitikkin hjá landsstýrinum og lýsti ikki, hví mett varð, at førleikin hjá tí, ið settur varð í starvið, svaraði betur til ásettu krøvini í starvslýsingini, enn førleikin hjá tí, ið ikki varð settur.
>
> Tað, at klagarin ikki bara hevði verið til setanarsamrøðu, men eisini í tilmælinum frá setanarnevndini varð mettur at verða best skikkaði umsøkjari at røkja starvið sum skúlastjóri, setti, sambært umboðsmanninum, enn strangari krøv til skylduna at grundgeva.
>
> Soleiðis sum málið var lýst, dugdi umboðsmaðurin ikki at síggja, hvat hevði verið avgerandi fyri, at avgerðin hjá landsstýrismanninum var øðrvísi enn metingin hjá setanarnevndini. Umboðsmaðurin fekk tí ikki gjørt sær eina meting av, um atlitini, ið landsstýrismaðurin hevði tikið í hesum máli, í roynd og veru vóru saklig, og um landsstýrismaðurin átti at lýst málið betri.
>
> Samanumtikið gav umboðsmaðurin Uttanríkis- og mentamálaráðnum eina átalu fyri ikki at geva klagaranum eina nøktandi grundgeving í sambandi við hetta setanarmál. Samstundis heitti umboðsmaðurin á Uttanríkis- og mentamálaráðið um at geva klagaranum eina nøktandi grundgeving og lata umboðsmanninum eitt avrit av henni.
> ..."

Sum nevnt í klagu klagarans, gav Uttanríkis- og mentamálaráðið, tann 1. november 2022, klagaranum soljóðandi grundgeving:

> **"Grundgeving fyri starvssetanini í Vestmanna**
> Vísandi til niðurstøðu í áliti hjá Løgtingsins umboðsmanni frá 1. juli 2022 viðvíkjandi klagu um málsviðgerðina ísv. setan av skúlastjóra í Vestmanna skúla, er Uttanríkis- og mentamálaráðið biðið um at geva eina grundgeving, ið lýsir hvørji atlit hava verið berandi fyri støðutakanina hjá landsstýrismanninum.

Uttanríkis- og mentamálaráðið hevur í trimum umførum grundgivið fyri avgerðini at seta ein annan av innstillaðu umsøkjarunum í starvið sum skúlastjóri í Vestmanna skúla, sbr. grundgeving, dagf. 13. sept. 2021, grundgeving, dagf. 7. okt. 2021 og grundgeving, dagf. 9. nov. 2021. Sambært álitinum hjá Løgtingsins umboðsmanni hava hesar grundgevingar ikki verið nøktandi, og hava vit tí verið málið ígjøgnum enn einaferð.

Sum nevnt í skrivi 9. november 2021 gjøgnumgekk landsstýrismaðurin alt tilfarið gjølla, sum lá í málinum um setan av skúlastjóra í Vestmanna. Í hesum sambandi valdi landsstýrismaðurin at leggja stóran dent á m.a. viðmælir enn setanarnevndin hevði gjørt. Í starvslýsingini, dagf. 7. juli 2021, varð eisini positivt lagt upp til at senda inn møgulig viðmælir saman við umsóknini í seinasta lagi 16. aug. 2021.

Avgerðir hjá einum fyrisitingarmyndugleika skulu verða grundaðar á øll viðkomandi og saklig fyrilit. Men leiðslurætturin gevur einum setanarmyndugleika rætt til at raðfesta ella viga ymisk saklig og viðkomandi fyrilit. Tá ið starvslýsingin beinleiðis leggur upp til, at møgulig viðmæli skulu vera ráðnum í hendi í seinasta lagi 16. aug. 2021, er tað ikki ósakligt at leggja serligan dent á viðmælini. Tey eru við til at lýsa persónligu eginleikarnar, og eru tískil í stóran mun við til at tryggja, at umsøkjararnir – umframt formligu og ófrávíkiligu krøvini – eisini hava persónligu eginleikarnir samsvarandi starvslýsingini, haruppií eginleikar til tess at fremja góðar arbeiðsumstøður og gott samstarv millum skúla og heim, og í samstarvi við foreldrini at virka fyri, at næmingarnir fáa eina mennandi og fjølbroytta undirvísing. Harumframt kunnu viðmælini í stóran mun vera við til at geva setanarmyndugleikanum eina ábending um, hvussu tann setti er førur fyri at inna eina mennandi starvsfólkaleiðslu, skapa umstøður hjá tí einstaka fyri samábyrgd og ávirkan og tryggja, at lærarar skúlans hava umstøður fyri fakligari menning.

Tygum valdi ikki at senda inn nøkur viðmæli innan nevndu freist, hóast starvslýsingin legði upp til tað. Tá ið landsstýrismaðurin so hevur valt at raðfesta viðmælini høgt, broytist innstillingin soleiðis, at tann setti bleiv mettur sum tann best skikkaði til starvið.

Harumframt varð dentur lagdur á fjølbroyttar og viðkomandi leiðsluroyndir, sum tann setti umsøkjarin í størri mun enn tygum varð mettur at hava.
...”

Eg bað eftirfylgjandi Barna- og útbúgvingarmálaráðið, um at geva mær eina frágreiðing til klaguna.

Tann 6. mars 2023 gav Barna- og útbúgvingarmálaráðið soljóðandi frágreiðing:

“...
Umsøkjararnir, sum vóru innstillaðir sum nr. 1 og 2 luku báðir treytirnar fyri at verða settir í starv sum skúlastjóri, og báðir umsøkjararnir vóru mettir at vera skikkaðir til starvið.

Førleikakrøvini vóru sambært starvslýsingini hesi:

- Umsøkjarar skulu hava fólkaskúlalæraraútbúgving og starvsroyndir í fólkaskúlanum
- Harumframt er tað ein fyrimunur, um umsøkjarar hava leiðsluroyndir og skeið ella útbúgving í leiðslu
- Hava áhuga fyri avbjóðingum og førleika at taka neyðugar avgerðir

Báðir umsøkjararnir hava fólkaskúlalæraraútbúgving og drúgvar starvsroyndir í fólkaskúlanum. Sostatt lúka báðir umsøkjarar fyrsta kravið.

Harumframt hava báðir umsøkjararnir leiðsluroyndir, og fyrst innstillaði hevur leiðsluútbúgving og næst innstillaði hevur skeið í leiðslu. Báðir umsøkjararnir lúka tí eisini næsta kravið.

> Síðsta førleikakravið var, at umsøkjarin skuldi hava áhuga fyri avbjóðingum. Her er í roynd og veru talan um eitt subjektivt krav, og ringt er objektivt at meta um, hvør hevur størri áhuga fyri avbjóðingum.
> Báðir umsøkjararnir sýndu áhuga fyri avbjóðingum og vístu, at teir megnaðu at taka neyðugar avgerðir.
>
> Út frá metingini hjá setanarbólkinum var fyrst innstillaði best skikkaði umsøkjari. Landsstýrismaðurin metti tó, at viðmælini, sum næst innstillaði hevði sent og fjølbroyttari leiðsluroyndirnar, áttu at viga meir í metingini.
> ...
> Landsstýrismaðurin vigaði leiðsluroyndirnar og hartilhoyrandi viðmæli hægri enn setanarbólkurin og kom til aðra niðurstøðu, enn mælt var til.
> ..."

**Niðurstøða**

Niðanfyristandandi tekur støði í avgerðini hjá landsstýrismanninum í uttanríkis- og mentamálum.

Tá landsstýrismaðurin tók avgerð um at seta umsøkjaran, ið var tilnevndur sum nr. 2 í starvið sum skúlastjóri í Vestmanna skúla, var hetta at meta sum ein fyrisitingarrættarlig avgerð. Tað merkir, at avgerðin og setanartilgongdin vóru fevnd av teimum skrivaðu og óskrivaðu reglum, ið galda í fyrisitingarrættinum, t.d. meginregluni um sakliga fyrisiting, skylduni at lýsa eitt mál til fulnar (da. officialprincippet) og skylduni at seta tann best skikkaða í starv.

Sambært starvslýsingini varð tað m.a. lýst at vera ein fyrimunur í mun til førleikakravið til starvið, at umsøkjari hevði *"leiðsluroyndir og skeið ella útbúgving í leiðslu".*

Soleiðis sum málið var lýst, kundu umsøkjararnir, ið vóru tilnevndir sum nr. 1 og 2, vísa á leiðsluroyndir. Eg meti meg ikki hava fortreytir at meta um, hvørjar leiðsluroyndir vóru best egnaðar í mun til starvið sum skúlastjóri í Vestmanna skúla. Eg fari tí ikki at viðgera hendan spurningin nærri.

Sum Barna- og útbúgvingarmálaráðið eisini vísur á, hevði umsøkjarin, ið var tilnevndur sum nr. 1 til starvið, eina leiðsluútbúgving, meðan umsøkjarin, ið var tilnevndur sum nr. 2, hevði skeið í leiðslu. Í viðgerð mínari, í sambandi við omanfyrinevnda álit, varð staðfest, at umsøkjarin, ið var tilnevndur sum nr. 2, einans hevði luttikið í undirvísingini í einum leiðsluskeiði, men ikki formelt lokið skeiðið.

Tað er við støði í hesum mín greiða fatan, at umsøkjarin, ið var tilnevndur sum nr. 1, hevði munin við atliti at *"...skeið og útbúgving í leiðslu".*

Í omanfyrinevnda áliti metti eg, at tað, at klagarin ikki bara hevði verið til setanarsamrøðu, men eisini í tilmælinum frá setanarnevndini einmælt varð mettur at verða best skikkaði umsøkjari til starvið, setti enn strangari krøv til skylduna at grundgeva. Eg tók undir við, at neyðugt var at fremja eina heildarmeting, tá umsøkjari skuldi setast. Eg helt tó, at tað ikki var í lagi at nýta eina heildarmeting sum grundgeving uttan at koma nærri inn á tann ella teir avgerandi tættir av

heildini, ið vóru avgerandi fyri, at avgerðin hjá landsstýrismanninum var øðrvísi enn tann hjá setanarnevndini.

Í grundgevingini, ið Uttanríkis- og mentamálaráðið gav klagaranum tann 1. november 2022, verður, umframt at vísa á fjølbroyttari og meira viðkomandi leiðsluroyndir, víst á, at landsstýrismaðurin legði størri dent á viðmælini, ið umsøkjarin, ið varð tilnevndur sum nr. 2, hevði lagt við síni umsókn, enn setanarnevndin. Nevnt verður, at viðmæli eru við til at lýsa persónligu eginleikarnar og eru tískil í stóran mun við til at tryggja, at umsøkjararnir – umframt formligu og ófrávíkiligu krøvini – eisini hava persónligu eginleikarnir samsvarandi starvslýsingini.

Eg havi, soleiðis sum málið er lýst, ikki orsøk at halda, at grundgevingin, sum klagarin fekk tann 1. november 2022, ikki gevur eina rætta lýsing av teimum atlitum, ið landsstýrismaðurin valdi at leggja dent á í sambandi við støðutakan hansara at seta umsøkjaran, ið var tilnevndur sum nr. 2 til starvið sum skúlastjóri í Vestmanna skúla.

Landsstýrismaðurin vísti í grundgeving sínari, dagfest 1, november 2022, ikki á, hvørji ítøkilig viðurskifti í viðmælunum serliga gjørdu seg galdandi í mun til hansara støðutakan. Hóast hetta, so er í málinum greitt, at viðmælini gjørdust ein berandi orsøk fyri endaligu avgerðini hjá honum at seta umsøkjaran, ið varð tilnevndur sum nr. 2, í starvið sum skúlastjóri í Vestmanna skúla.

Viðmæli og tilvísingarpersónar eru íkast frá umsøkjarum, ið hava sum endamál at veita setanarmyndugleikanum eina uttanveltaða lýsing av eginleikum, bæði jaligum og neiligum, hjá einum umsøkjara í sambandi við, at setanarmyndugleikin lýsir eitt setanarmál til fulnar. Setanarmyndugleikin eigur tí at hava í huga, at skrivlig viðmæli, umframt at lýsa faktuel viðurskifti hjá umsøkjaranum, í høvuðsheitum lýsa jalig viðurskifti hjá umsøkjaranum. Sama ger seg í ávísan mun galdandi fyri tilvísingarpersónar, tó hevur setanarmyndugleikin í slíkum føri betri møguleika at skapa sær eina meiri fjølbroytta mynd av umsøkjaranum. Sum dømi kann nevnast, at eitt jaligt skrivligt viðmæli kann geva einum setanarmyndugleika orsøk og ynski um at seta seg í samband við ein tilvísingarpersón hjá hesum sama umsøkjara fyri at lýsa málið til fulnar.

Soleiðis sum málið er lýst og vísandi til skylduna at lýsa eitt mál til fulnar, undrar tað meg, at landsstýrismaðurin ikki tók stig til at kanna, um viðurskiftini í viðmælunum hjá umsøkjaranum, ið var tilnevndur sum nr. 2, sum høvdu sannført hann, kundu samanberast við viðurskifti hjá umsøkjaranum, ið varð tilnevndur sum nr. 1 av einari samdari setanarnevnd. Eitt nú kundi landsstýrismaðurin heitt á umsøkjaran, ið varð tilnevndur sum nr. 1, um at lýst ávís viðurskifti nærri ella sett seg í samband við tann ella teir tilvísingarpersónar, ið umsøkjarin, ið varð tilnevndur sum nr. 1, hevði upplýst í sambandi við setanartilgongdina.

Sum meginregla er tað ikki ósakligt at leggja dent á viðmæli, ið umsøkjari hevur lagt við sínari umsókn. Tó haldi eg tað vera atfinningarsamt í ítøkiliga málinum, at landsstýrismaðurin legði

avgerandi dent á ávís viðurskifti í viðmælunum hjá tí, ið var tilnevndur sum nr. 2, uttan at gera eina roynd at fáa eina sambæriliga lýsing av umsøkjaranum, ið var tilnevndur sum nr. 1.

Samanumtikið fari eg tó ikki at gera meira við málið. Hesa fatan grundi eg á, at báðir umsøkjararnir av setanarnevndini vórðu mettir skikkaðir at røkja starvið sum skúlastjóri í Vestmanna skúla, rúmu tíðina, ið er fráliðin, og at starvið sum skúlastjóri í Vestmanna skúla síðani hevur verið lýst leyst av nýggjum.

Skrivið verður í næstum almannakunngjørt á heimasíðu okkara í navnleysum líki.

Avrit av hesum skrivi er sent klagaranum til kunningar.

Vinarliga

Hanna Vang
Løgtingsins umboðsmaður